## Ungarn styðjar Ísland

Ungarn fer at styðja íslendsku umsóknina um limaskap í Evropasamveldinum. Tað sigur Gabor Ivan, sum sambært tíðindatænastuni MIT er ein týðandi embætismaður í ungarska uttanríkisráðnum. Embætismaðurin sigur við MIT, at tann ungarska stjórnin er fegin um umsóknina úr Íslandi og metir Ísland sum ein náttúrligan part av teirri evropeisku eindini. Embætismaðurin heldur, at tann íslendska umsóknin eigur at fáa somu viðgerð sum umsóknin úr millum annað Kroatia. Tað merkir sambært embætismanninum, at í bíðiröðini eftir limaskapi eigur Ísland at standa undir liðini á Kroatia.



## Til Danmarkar at fáa børn

Stakar kvinnur, sum eru barnleysar, men sum fegnar vilja hava eitt barn, kunnu fáa ynskið uppfylt við at fara til Danmarkar, skrivar Berlingske Tidende. Danmark og Spania eru tey einastu londini í Evropa, har stakar kvinnur kunnu fáa ísáðing, og tað ger, at stakar kvinnur streyma til Danmarkar úr øllum ættum, skrivar blaðið. Allar hava somu ørindi: At gerast við barn. Klinikkin Vitanova, sum hjálpir kvinnum at gerast við barn, sigur við Berlingaran, at nógvar útlendskar kvinnur velja at taka av tilboðnum í teirri lagaligu donsku lóggávuni. Sagt verður, at tað eru serliga stakar kvinnur úr Svøríki, Týsklandi og Fraklandi, sum koma til Danmarkar at fáa børn.

# Bingo á Rás2

**Í september byrjar nýtt bingo-spæla á Rás2. Stjórin á rásini lovar bæði gott undirhald og góðar vinningar**

BINGO
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hvørt sunnukvøld verður bingo-kvøld á Rás2.

Í september mánaði byrjar rásin við bingo-spæli, har allir lurtarar hava møguleika at taka lut.

- Rás2 fær fleiri og fleiri lurtarar, og seinasta hálva árið hava vit fingið fleiri áheitanir um at skipa fyri onkrum eydnuspæli fyri lurtarunum. Vit síggja tað hvønn dag, tá vit hava kappingar, at áhugin fyri kappingunum er sera stórur – upp í 2.000 SMS eru móttikin í einstøkum førum, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

- Tað hevur eisini víst seg, at vit ta seinastu tíðina hava fingið nógvar eldri lurtarar, og hesi eru ofta sera áhugað í spælum av hesum slag. Vit hava verið hjá øðrum líknandi útvarpsstøðum í Norðanlondum og kanna, hvussu tey gera. Og tað vísir seg, at eydnuspøl eru nakað, sum lurtararnir vilja hava, sigur Jonhard Hammer.

Akkurát hvat fyri slag av spæli talan verður um, vil Jonhard Hammer ikki avdúka enn, men hann vísir bara til slagorðið hjá Rásini um, at »Tað eru vit, sum gera tað stuttligt at búgva í Føroyum«. Og so lovar stjórin á Rási2 annars, at nýggja spælið verður bæði spennandi og undirhaldandi og við sera, sera góðum og spennandi vinningum.

- So fólk hava onga orsøk at stúra fyri myrku tíðini í vetur, tí sunnukvøldini verða í øllum førum stuttlig, sigur Jonhard Hammer.




*Hvørt sunnukvøld í vetur fer Rás2 at hava Bingo fyri lurtarunu*






# Steintór tikin fyri ólógligan fiskiskap



*Brimil kom við Steintóri inn á Havnina klokkan 10 í morgun*
*Mynd: Rógvi Nybo*

**Í nátt varð hvalbiartrolarin Steintór tikin á eystara kanti av Munkagrunninum. Innan í trolposanum hevði hann enn ein posa við smærri meskum**

FISKISKAPUR
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Hvalbiartrolarin Steintór er tikin fyri ólógligan fiskiskap á eystara kanti av Munkagrunninum. Brimil kom við Steintóri á Havnina klokkan 10 í morgun.

Brimil kom fram á Steintór í gjárkvøldið, har hann fiskaði upsa.

Tá menn av Brimli fóru umborð at kanna úterðina, vístu kanningar, at hann innan í trolposanum hevði ein annan posa við smærri meskum í. Tí varð Steintór tikin fyri ólógligan fiskiskap.

Teir settu Havnini stevnu um hálvgum tvey, og klokkan 10 komu teir inn á Vestaru Bryggju. Løgreglan tekur sær nú av málinum.